


Authentic Unique Fresh

WWW.NORTHADVENTURES.FO
TEL. 219507

Sosialurin 341800






# Enniberg *heimsins hægsta forberg*

Matstovan hjá Elisabeth á Viðareiði bjóðar nú eina nýggja tænastu, har tey vitjandi kunnu uppliva heimsins hægsta forberg og ein søguligan túr gjøgnum bygdina

Matstovan hjá Elisabeth á Viðareiði skipar sum nakað nýtt fyri tveimum ymiskum túrum. Annar túrurin er niðan á Enniberg, sum er heimsins hægsta forberg, og hin túrurin er ein gongutúrur gjøgnum bygdina. Báðir túrarnir eru við staðkendum ferðaleiðara.

Túrarnir kunnu keypast sum ein pakki saman við eini máltíð á matstovuni. Tey, sum tekna seg til túrin niðan á Enniberg, fáa umframt mat á matstovuni eisini matpakka við til túrin.

Viðareiði er ein søgulig bygd, og nógv er at greiða frá sum t.d. um prestagarðin í Ónagerði og kirkjuna. Fyri tey sum ynskja tað er møguleiki fyri rundvísing inni í kirkjuni við lokalum frásøgufólki. Gongutúrur verður eisini til teir stórslignu laðaðu garðarnar, sum hava sína serligu søgu.

Matstovan liggur væl fyri í bygdini, og umstøðurnar eru góðar við eini fjølbroyttari matskrá í hugnaligum umhvørvi. Eisini ber til at njóta eitt glas av víni afturvið matinum. Hølini eru væl atkomilig fyri fólk í koyristóli.

VIÐAREIÐI, TEL. 451275 / 222450

*Matstovan hjá* ELISABETH